# Skótadepil í slóðbrótandi endurnýgging

**Fjallaklintring, vatnskí og paragliding skulu vera millum nýggju tilboðini á skótadeplinum á Selatrað, ið nú skal upp á eitt uppaftur hægri stig**

TÍÐINDASKRIV

- Grundleggjandi fasilitetirnir eru komnir upp á pláss. Nú fara vit undir næsta stig, ið skal gera Skótadepilin á Selatrað til ein frítíðarmiðdepil fyri ung og familjur, ið kann sammetast við tað, vit síggja uttanlands.

Tað sigur Jan á Argjaboða, limur í starvsnevndini hjá KFUM-skótunum í Føroyum.

### Nýmótast føroyskt "Activity Center"

Leiðslan fyri KFUM-skótarnar er farin undir at nútíðargera og menna skótavirksemið, soleiðis at ungdómur og føroyskar familjur sleppa at uppliva virksemi, sum tey annars einans síggja í sjónvarpinum ella uppliva, tá tey eru í summarfrí í suðurlondum.

Karmurin um virksemið verður skótadepilin á Selatrað, ið verður útbygdur frá at vera eitt stað við soviplássum og køksfasilitetum til at verða Føroya størsti og besti virksemisdepil – eitt 'activity center' – soleiðis sum vit kenna tað úr øðrum londum.

Umframt at bjóða ungdómi spennandi og avbjóðandi uttanduravirksemi í rúsfríum umhvørvi, skal depilin eisini virka sum karmur fyri tilboðum til familjur.

### Náttúrligt tilboð í hesum tíðum

Børn, ung, foreldur, ommur og abbar skulu kunnu hugna sær saman, meðan tey royna alskyns frítíðartilboð. Hetta er eisini eitt náttúrligt tilboð at geva føroyskum familjum, nú tíðirnar neyvan eru til dýrar uttanlandsferðir.

Júst í hesum døgum verða umsóknir sendar kommununum, fyritøkum og grunnum um at stuðla útbygginini á Selatrað.

- Vit vóna, at undirtøkan verður góð, so ungdómur og familjur í Føroyum kunnu fáa upplivingar fyri lívið í egnum landi.





· Konsertir
· Fundir
· Framsýningar
og annað

miðlahúsið
í Vágsbotni

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



Ring og hoyr nærri

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO
Sosialurin